Um fyrilestrahaldararnar á Aliráðstevnuni 2015

Jan Erik Øksenvåg, Kontali Analyse

<u>Marknaðarútlit fyri alivinnuna</u>

Jan Erik Øksenvåg er deildarleiðari í norsku greiningarfyritøkuni Kontali Analyse, har hann m.a. hevur ábyrgdina av havbúnaðarøkinum. Jan Erik Øksenvåg fer at leggja fram um marknaðarútlitini fyri laks, og hann fer eisini at samanbera úrslitini hjá føroysku alivinnuni við úrslit aðrastaðni.

Rúni Dam, Avrik

<u>Fiskagoymsla og metingar</u>

Rúni Dam er stovnari og eigari av fyritøkuni Avrik, sum m.a. framleiðir hagtøl til føroysku alivinnuna. Rúni fer at leggja fram hagtøl um fiskagoymslurnar og metingar um gongdina, og fer eisini at leggja fram besta úrslit fyri 2014.

Johnny í Grótinum, Búskaparfrøðingur

<u>Týdningurin av alivinnuni í samfelagsbúskapinum</u>

Johnny í Grótinum er búskaparfrøðingur, og fer hann at greiða frá um leiklutin hjá alivinnuni í samfelagsbúskapinum.

Harald Takle, Nofima

<u>Fysisk venjing av smoltum – ávirkan á fiskaheilsu</u>

Harald Takle er granskari hjá norsku ráðgevingarfyritøkuni Nofima, og fer hann at greiða frá, hvussu fysisk venjing av smoltum ávirkar heilsustøðu og vøkstur hjá laksinum.

	Chris Matthews, Fishvet Group **<u>Status um AGD – Amoebic Gill Disease</u>** Chris Matthews er djóralækni í ráðgevandi fyritøkuni FishVet Group, og fer hann at greiða frá um sjúkuna AGD, sum hevur gjørt um seg í grannalondunum í fleiri ár.
	Jónas Jónassson, Stofnfiskur **<u>Aling á Íslandi – status og framtíðarætlanir</u>** Jónas Jónasson er leiðari hjá íslandsku fyritøkuni Stofnfiskur, sum m.a. framleiðir rogn til alivinnuna, og er eisini formaður í íslendska havbúnaðarfelagnum. Hann fer at greiða frá status og framtíðarætlanir innan aling í Íslandi.
	Jonhard Eysturskarð, Fiskaaling **<u>Lúsaniðurberjing við at tálma enzymir/DNA-markørar</u>** Jonhard Eysturskarð er deildarleiðari hjá Fiskaaling. Á aliráðstevnuni leggur hann fram um eina nýggja verkætlan, sum snýr seg um at minka um trupulleikan við laksalúsini við at tálma enzymir, og úrslitini frá einari verkætlan um at skilja millum siljafiskar og rognafiskar við at nýta DNA-markørar
	Gunnvør á Norði, Fiskaaling **<u>Lúsayngul á alifirðum</u>** Gunnvør á Norði er granskari hjá Fiskaaling, og fer hon at greiða frá hvussu lúsayngul spjaðast á alifirðum.

	Bogi Jacobsen, Luna **<u>Stríðið móti laksalúsini – hvat ger Luna</u>** Bogi Jacobsen starvast hjá føroysku alifyritøkuni Luna, og fer á aliráðstevnuni at greiða frá teimum tiltøkum sum Luna hevur sett í verk í royndunum at fáa bilbukt við laksalúsini.
	Andreas Lindholm, Norsk Oppdrettsservice **<u>Norsku royndirnar við viðgerð móti laksalús</u>** Andreas Lindholm er leiðari í norsku ráðgevingarfyritøkuni Norsk Oppdrettsservice, og hevur drúgvar royndir at ráðgeva alifyritøkum um laksalús. Í framløguni fer hann at greiða frá um tær royndirnar, sum tey hava gjørt sær í Noregi við fyribyrgjandi tiltøkum og viðgerð móti laksalús.

Havbúnaðarfelagið
FAROESE FISH FARMERS